gult cyan magenta svart

Tíðindablaðið **sosialurin**
Internet: www.sosialurin.fo

**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov

**Marknaðadeild:** Jonhard Hammer, Dagbjørt S. Hansen, Hjørdis Árnadóttir
**Blaðfólk:** Áki Bertholdsen, Turið Kjølbro, Dagfinn Olsen, John Johannessen, Sveinur Tróndarson, Eyðun Klakstein, Edvard Joensen, Rúnar Reistrup, Dia Midjord, Stefan í Skorini
**Ítróttur:** Jákup Mørk
**Myndamenn:** Jens Kristian Vang, Álvur Haraldsen
**Útgevari, uppseting:** Sp/f Sosialurin

**Bústaður:** Argjavegur 26, Argir
**Postadr:** Postsmoga 76, 110 Tórshavn
**Telefon:** 311820 **Fax.** 314720
**e-mail:** post@sosialurin.fo
**Lýsingar:** lysing@sosialurin.fo
**Prent:** P/F Prentmiðstøðin

# Politikararnir svikið sjónvarpið

## *Oddagrein*

NÚ um dagarnar segði stjórin í SvF upp. Møguliga eftir trýsti fyri vánaliga fíggjarliga úrslitið hjá stovninum. Landsstýrismaðurin hevur ikki dult fyri, at onkur mátti taka avleiðingarnar av hesum úrsliti. Tað hevur Tróndur Djurhuus nú gjørt. Tað er eftir okkara tykki stórur missur fyri stovnin, tí stavnhald hansara hevur verið at byggja upp eitt nútímans føroyskt sjónvarp, og var hetta komið væl áleiðis. Ein uriaspostur, ið vegna tørvandi politiska uppbakking, hevur verið ómøguligur at liva upp til av sjálvt tí besta. Hetta hava verið nøkur ár við stórari menning í sjónvarpinum sum stovni. Tá undirtøkan at fara undir at byggja nýtt sjónvarpshús ikki var nóg stór, hevur verið roynt at byggja út á verandi øki, og hetta vita vit er nakað, sum kann kosta nógv, tá avtornar. At menna stovnin innihaldsliga um somu tíð sum fysisku karmarnir verða betraðir, er eitt stórt og tungt tak. Tá politikararnir so ikki hava viljað sett neyðuga peningin av til menningina av hesum stovni, hevur leiðslan verið noydd at dúva uppá inntøkur frá spæli og lýsingum. Slíkar eru svikaligar. Tað hevur tó eydnast stjóranum at skapa hesum stovni nakrar nýggjar karmar, sum so skuldu vera tað grundarlag, ið alt framtíðar innihaldið skuldi byggjast á. Gjørdar eru íløgur, sum skuldu bera stovnin inn í framtíðina. Í øllum hesum stríði hevur leiðslan so mist yvirlitið yvir fíggjarligu støðuna.

FØROYINGAR kenna Trónd Djurhuus sum ein av okkara dugnaligastu journalistum. Fáur hevur dugað sum hann at verið vertur fyri sendingum, sum vit øll hava virðismett høgt. Tað eru eisini tey, sum siga, at hansara pláss er á skíggjanum og ikki inni á teimum stressaðu stjórakontórunum. Vit eru eitt so lítið land, at tað er eisini avmarkað við gávuríkum fólki til slíkar uppgávur. Tað skal vera okkara vón, at hesin evnaríki og fryntligi TV-verturin aftur fer at teljast millum virknu journalistarnar í landinum, hvar hann so enn endar. Eingin ivi er um, at sjónvarpið verður fátækari uppá dygd og engagement, nú Tróndur ikki verður at síggja longur á skíggjanum. Tað má vera okkum loyvt at gita, at hann kortini onkursvegna fer at gera journalistiska karrieru aftur á hesum stovni ella aðrastaðni. Føroyska pressan hevur rætt og slætt brúk fyri honum.

SJÓNVARPSSTJÓRIN hevur tikið á seg ábyrgdina av vánaliga úrslitinum. Hetta er tó eisini ein áminning til allar føroyingar um, at tað almenna Føroyar hevur svikið. Landsstýrið og fyri tað løgtingið hava ikki viljað givið stovninum karmar at virka undir, sum tað sømir seg einum tjóðarsjónvarpi í 21. øld í einum sjálvbjargnum Føroyum. Til verju fyri sjónvarpsstjóran talar, at løgtingið og landsstýrið ongantíð vildu geva Sjónvarpi Føroya teir neyðturviligu fíggjarligu karmar at arbeiða undir, soleiðis at sjónvarpið kundi lúka tey krøv, sum somu myndugleikar áløgdu sjónvarpinum. Teir áløgdu nevniliga sjónvarpinum við kringvarpslógini og tí sokallaða Øravíkarskjalinum, at 30% av senditíðini skuldi vera føroysk og at halda eitt høgd dygdarstøði. Eingin sjónvarpsstjóri í allari verðini og heldur einki sjónvarp kann lúka slík kvalitetskrøv uttan eina játtan á fíggjarlógini. Samanumtikið má man siga, at Tróndur Djurhuus hevur havt øgiliga truplar umstøður at arbeiða undir, og tað má vera okkara vón, at myndugleikarnir nú taka fylgjurnar av hesum og geva einum komandi sjónvarpsstjóra og sjónvarpi ta fíggjarliga støði, sum skal til, soleiðis at føroyingar fáa gott sjónvarp. Gott sjónvarp er einasta mótverja móti tí vánaliga, sum børn og ung fáa inn í stovnurnar frá video og parabolum. Lagnunnar speisemi er tað annars, at nettupp nakað av tí annars góða researcharbeiði, sum táverandi journalisturin Høgni Hoydal slapp at gera í bankamálinum - lopfjølini til Tinganes - er ein partur av tí undirskoti, sum nú feldi stjóran.

***Sosialurin***

## Viðmerking

# Góð roynd, Høgni, men tú er avdúkaður



Ikki allastaðni í heiminum sita grannar væl um sátt. Vit hava sæð dømi um hetta t.d. á Kypros, í Jerusalem, í Johannesburg, í Belfast og nógva aðra staðir runt um í heiminum. Og sjálvt um stríðið kanska eina tíð kann tykjast vera niðurlagt, so skal so ótrúliga lítið til, fyrr enn alt aftur stendur í ljósum loga. Tað kann bert vera talan um eina lítla provokatión, sum síðan fær øll sinnini aftur í kók. Og tíverri síggja vit eisini, at ávísir bólkar, sum ikki trívast við friðin, teir festa í aftur við fríum vilja.

Føroyingar hava av landafrøðiligum ávum onga veruligar nærar grannar, sum dagliga kunna minna okkum á, at vit ikki eru einsamallir í verðini. Danir eru hin vegin okkara politisku grannar, hóast einir 1500 km. eru í frástøðu millum londini.

Ikki altíð hava føroyingar og donsku grannar okkara sitið so væl um sátt og langt frá tí. Óneyðugt er at fara øldir aftur í tíðina, tí vit hava feskastu dømini her í byrjanini av 90´unum, har stríðið mangan var sera harðligt millum partarnar. Men so við og við legði stríðið seg, vit fingu meira normal viðurskifti millum londini, og vit fingu avgreitt nøkur mál, sum júst høvdu medvirkað til spentu viðurskiftini.

Og nú hevur friður valdað í eina tíð, men knappliga bendir mangt á, at menn nú við beráddum huga aftur eru í ferð við at festa í aftur. Og samanbrestirnir eru eitt endamál í sær sjálvum.

Seinastu tíðina hava vit havt ikki færri enn fýra samanbrestir millum føroyskar og danskar myndugleikar:

- Fiskivinnusamstarvið millum Føroyar - Ísland - Grønland
- Sáttmálin um landspartamál
- Brævið til ST
- Brævið til aðalskrivaran í Nato

Hóast málini eru ymisk í innihaldi, so er tað týðiligt at felagsnevnarin er, at landsstýrið og stjórnin duga ikki einfælt samráðingarlag. Eg eri sannførdur um, at í hvørfall hesi seinastu, men allarhelst øll kundu verið loyst uttan nakran sum helst trupulleika, høvdu partarnir tosað eitt sindur saman.

Men loysnin av málunum við ST og Nato hevði ikki nakað endamál fyri landsstýrið, tað var als ikki hetta, málið snúði seg um.

Fyri meg at síggja er strategiin hjá Tjóðveldisflokkinum og Høgni Hoydal púra greið. Fáa vit ikki fullveldið við samráðingum, so skulu vit í minsta lagi syrgja fyri, at viðurskiftini millum Føroyar og Danmark gerast so út av lagi vánalig, at antin síggja føroyingar onga aðra loysn enn loysing, ella kanska loysa danir frá okkum. So ein skipa loysing antin so ella so.

Við hesi strategi leggur so Høgni Hoydal til brots. Íðin, sum hann er, og við vælvaldum orðum fær hann skjótt løgmann linan í kongunum, og so er bara at fara til verka.

Løgmaður, ein hentur stavnamaður hjá tjóðveldismonnum, letur seg brúka ella rættari misbrúka, og við báðum beinum er hann lopin í felluna og heldur enntá aftaná, at hann sjálvur hevur funnið upp á alt hetta. Og sum um tað ikki var nóg mikið, so eydnast eisini tjóðveldismonnum at fáa danska uttanríkiráðharran at spæla við og geva landsstýrinum júst tey svar og tey brøv, sum landsstýrið innast inni gjarna vil hava til seinni brúk.

Høgni Hoydal hevur tilvitað, men við duldum motivum sett henda sjónleik í verk, tí nú vil hann hava eina nýggja orrustu millum londini. Nú er einki bankamál, so hvat er annað til ráðar at taka. Við beráddum huga hevur hann saman við góðum ráðgevum sínum sett henda leikin upp, sum hevur eittans endamál, og tað er at fáa samanbrestir. Har man í Belfasr brúkar bensinmumbur, so brúkar landssstýrið ístaðin ein góðtrúnan løgmann og embætisfólk til at senda brøv í eystur og vest, sum ikki hava annað til endamáls enn, at vit fáa nakrar samanbrestir við donsku stjórnina.

Og Gud hjálpi mær, so situr hinumegin borðið ein líka góðtrúgvin uttanríkisráðharri, sum eisini letur seg draga upp á tráð, og so kann leiktjaldið dragast frá, og sjónleikurin kann byrja.

Eitt nøktandi svar frá ST ella ein fundur við Nato-aðalskrivaran hevði verið ein strika í rokningini hjá Høgna. Hann fekk júst tað, hann vildi hava - samanbrestir.

Ein dugnalig roynd Høgni, men hon er avdúkað.

**Jóannes Eidesgard**


# Tøkk

Øllum tykkum, ið á ymsan hátt gjørdu okkum føðingardag mín 31/8 so minniligan, takka vit hjartaliga. Stuttligt at tit komu so fjølment – vónandi verða stundir til meiri prát við hvønn einstakan tykkara eina aðru ferð! Takk eisini fyri gávur, blómuheilsanir, brøv, fjarrit og uppringingar.

*Blíðar heilsanir*
**Sverri Egholm**

# Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, sum á ymsan hátt sýndu samkenslu, tá ið mamma okkara

**ÁSLEYG WINTHER JACOBSEN**

doyði og varð jarðað.

**Elin Súsanna, Ingun og Randi**

# Tøkk

Øllum tykkum, sum hjálptu og mintust, tá kæra kona, mamma, omma, vermamma og langomma okkara

**BORHILD JOENSEN**
**á Strondum**

á sjúk, doyði og fór til gravar, takka vit hjartaliga.

*Familjunnar vegna*
**Kristjan**




# Knapt 20 umsóknir um rækjur

*Tað eru knapt 20 umsóknir komnar til fiskimálaráðharran um at sleppa at fiska rækjur. Jørgen Niclasen hevur tó onga avgerð tikið enn um,hvussu nógv varandi loyvir verða givin*

ÓLAVUR Í BEITI



*Jørgen Niclasen, fiskimálaráðharri*

Síðan fiskimálaráðharrin var í fjølmiðlunum og segði, at hann fór at royna at fáa sum mest úr okkara rættindum og umhugsaði at skriva út nýggj rækjuloyvi, eru knapt 20 umsóknir um at sleppa at fiska rækjur komnar í Fiskimálastýrið.

Tað er á nøkrum leiðum, eitt nú við Svalbard, at rækjuskipini ikki fiska alt dagatalið og tí umhugsaði fiskimálaráðharrin at útskriva nøkur loyvi aftrat. Tal er ikki sett á, hvussu nógv loyvi talan er um.

**Tilsøgnir**

Fiskimálastýrið hevur givið tilsøgnir um loyvi at fiska í eitt ár, men hetta hevur ikki verið besta loysnin, tí áhugin er ikki fyri slíkum og fíggingarstovnarnir hava ongan hug at verða við í prosjektum í eitt ár.

Jørgen Niclasen, fiskimálaráðharri sigur, at vit hava mist fleiri hundrað milliónir, tí vit hava ikki brúkt hesar tilsøgnir og tí er tað vit umhugsa at geva fleiri varandi loyvir.

– Tað er nógv við at henda innan hesa vinnu nú, sigur Jørgen Niclasen, og vit skulu fult nýta okkara rættindi, men tað er sera umráðandi at undirstrika, at vit umhugsa framvegis at geva fleiri rækjuloyvir og eg veit ikki, henda umhugsunartíð er umliðin.

– Nógvir spurningar skulu greiðast, áðrenn loyvini verða givin, leggur fiskimálaráðhaarin aftrat.



# Skulu flagga føroyskt

*Tvey stór ferðamannaskip hava verið á Havnini seinastu dagarnar, men bæði hava havt Dannebrog í húnar hátt, hóast lógin sigur, at tað skal verða Merkið*

STEFAN Í SKORINI

Tað er ikki líkt til, at tey stóru ferðamannaskipini, sum hava vitjað høvuðsstaðin seinastu vikuna, hava kannað lógina nóg gjølla ella yvirhøvur hirt at skeitt í hana. Bæði tað ovurstóra Rotterdam og Delfin hava havt teir reyðu og hvítu litirnar blaktrandi í tí nógva vindinum.

Tað er nevnliga greitt fyriskrivað, at skip, sum koma inn í føroyskar havnir at liggja, skulu hava tað føroyska flaggið veittrandi og ikki tað danska.

Hetta hevur ikki verið virt av teimum stóru ferðamannaskipunum, ella eru tey bara óvitandi um, at Føroyar ikki longur eru í amtstøðu, sum fyri meira enn hálvthundrað árum síðani.

Av Havnarskrivstovuni verður sagt, at lógin sigur, at føroyska flaggið skal verða nýtt í føroyskum havnum. Hesi boðini hava ferðamannaskipini eisini fingið frá Havnarskrivstovuni, og tí er bara at kvetta Dannebrog og fáa tann føroyska klútin upp aftur, har hansara rætta pláss er.

Hósdagin hevði Delfin enn danska flaggið veittrandi, men fríggjamorgunin var als einki flagg vundið á stong.

Eisini verður sagt av Havnarskrivstovuni, at einki verður gjørt víðari við máli, men tað fer óátalað aftur við borðinum - hesaferð.


